Góðu tit øll, nýføðingar, systkin og foreldur,

Hjartaliga vælkomin. Sjáldan hava vit havt eina so dýrabara og serstaka orsøk til, at møtast sum júst nú.

Eg havi bjóðað tykkum her í dag, tí eg ynski at markera, at vit eru farin upp um 50.000 fólk. Hetta er ein søguligur varði. Og øll í Føroyum, eiga sín lut í fólkavøkstrinum. Tit eru tó bjóðað, tí at vit hava mett, at fólkatalið sannlíkt fór upp um 50.000 í tíðarskeiðinum 1.-7. mars, júst í tí vikuni, har tykkara børn vórðu fødd.

“Morgun og nýføddi grátur,
vælkomin lítli stíg inn,
í hendan heimin sum gestur,
kanska tú dvølir eitt bil”.

Soleiðis yrkir Martin Joensen, meðan hann á Føðideildini bíðar eftir, at sonur sín verður borin í heim. 9 mánaðir kunnu tykjast long tíð. Men teir ganga skjótt. Og brádliga er enn eitt undurfult lív her, sum kollveltur lívið hjá foreldrunum.

“Ábyrgdini á tínum herðum,
gáva frá okkum til tín.
Byrða, ið tung er at bera,
ber hana betur enn vit.”

Soleiðis yrkir Martin Joensen víðari.

Tað er ein ómetaliga stór ábyrgd at verða foreldur, og seinni í lívinum mugu vit taka ábyrgd fyri okkara egna lívið og samfelagnum har vit búgva. Mín politiska ábyrgd sum løgmaður er somuleiðis ómetaliga stór. Tí vit politikarar hava skyldu at tryggja so góð gróðrarlíkindi fyri fólkavøkstri og vælferð, sum til ber.

Fyri hetta landsstýrið merkir tað at ansa væl eftir okkara landi og tilfeingi. Vit mugu skapa eitt samhaldsfast og javnsett samfelag, har fólk flest tíma at búgva, og har tað er liviligt at búgva. Føroyar skulu verða fyri ung, gomul, barnafamiljuna, støk, útisetar og tilflytarar. Tit skulu tíma og hava møguleikan at búgva her í dag. Samstundis sum tykkara børn skulu tíma og hava møguleikan at búgva her um 50 ár.

Eg ynski tykkum øllum hjartaliga til lukku við tykkara børnum, sum longu eru yvir ein mánað gomul. Tit byggja á tær herðar, ið sleptu. Tit bera hetta samfelagið. Og tykkara børn bera framtíðina. Takk fyri tað.

Nú er tað ein so vakur sigur at geva einum nýføðingi eina vælkomu gávu, og tað ynski eg eisini at gera. Tit eru tískil vælkomin fram her, at taka ímóti gávunum, sum liggja aftanfyri meg. Takk fyri.